Lundin svíkur »tí honum vantar føði«

– Tað er nærliggjandi at hugsa sær, at samband er millum nebbasildina, sum lundin livir av og lítla gróðurin í sjónum, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni

FUGLAVEIÐA
Vilmund Jacobsen

Tað hevur vignast illa við lundanum í ár. Kring landið, har menn plaga at ganga við stongini, lata teir illa at. Eisini fréttist, at nógvar lundapisur ikki eru undankomnar, men liggja deyðar í holuni.

Orsøkin kann bert vera hin eina, nevniliga, at fuglinum vantar føði.

Misjøvn ár

Tað er nú ikki nakað nýtt fyribrigdi, at summi ár roynast verri til fugl enn onnur.

Vit skulu ikki so langt aftur í tíðina, tá ið sama fyribrigdi gjørdi seg galdandi. Tíðliga í nítiárunum var fuglurin eisini fyri felli. Sildberar sóust stundum bera onnur fiskasløg enn nebbasild, ið er vanliga føðin hjá lundanum. Tá ið so er, spyrst lítið burtur úr avkominum, og vanliga er lítil fuglur við landið eitt tílíkt summar.

Er lítil nebbasild við landið, noyðist fuglurin til havs eftir føðini. Tað gongur út yvir pisurnar og útyvir veiðina hjá teimum, sum sita uppi í urðini ella í berginum við stongini.

Slík ár ganga serliga útyvir tann fuglabólkin, vit vanliga rópa svartfugl.

Gróður og nebbasild

Vit spurdu leiðaran á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalta í Jákupsstovu, hvørja viðmerking hann hevur til, at so lítið av lunda hevur verið at fingið í summar.

– Tað er torført at meta um, hví so er, men nærliggjandi er at hugsa sær, at ov lítið av nebbasild hevur verið við landið. Fuglurin hevur tí hildið seg longur úr landi enn vanligt er um summarið.

Fiskirannsóknarstovan byrjaði at gera gróðurkanningar í 1990.

– Hetta árið var gróðurin í sjónum ógvuliga lítil. Sama var í fjør, tó at gróðurin var heldur frægari enn í 1990. Hesi bæði árini var gróðurin tó langt, langt undir miðal.

Hjalti í Jákupsstovu vísir á, at fyrst í nítiárunum og nú aftur í ár hevur lundin ikki havt tað gott.

– Tí kann tað vera nærliggjandi at hugsa sær, at samband kann vera millum nebbasildina og lítla gróðurin í sjónum, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni.

Vit kunnu leggja aftrat, at hóast lundin sveik í summar, er ikki víst, at havhestatíðin, sum nú stundar til, fer at roynast líka illa, tí lundi og havhestur søkja sær føði á hvør sín hátt, og føðin er ymisk.

Tað er ikki víst, at havhestatíðin, sum nú stundar til, fer at roynast líka illa sum lundatíðin, tí lundi og havhestur søkja sær føði á hvør sín hátt, og føðin er ymisk

Clare fer úr sigling um ein mánaða

- Tá ið summarsesongin er av, og færri bilar verða at flyta við Norrønu, fer nýggja skipið einsamalt at taka sær av øllum flutninginum hjá felagnum, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line

FLUTNINGUR
Vilmund Jacobsen

Clara gevst at sigla fyri Smyril Line, 11. september

11. september gevst Clare at sigla við farmi fyri Smyrli Line. Tá hevur felagið leigað skipið til farmaflutning í eini tvey ár ella so.

Óli Hammer, stjóri, sigur, at nýggja Norrøna fer at røkja allan flutningin í vetur, sum felagið hevur.

– Vit meta, at Norrøna hevur nóg stóran kapasitet at taka sær av øllum farminum, nú summarsesongin fer at halla, og bilarnir verða færri, sigur hann.

Gamla liggur

Herfyri ljóðaði, at Smyril Line hevði ætlanir um at seta gomlu Norrønu, sum enn liggur í Esbjerg, at sigla í vetur, samstundis sum nýggja skipið fór í aðra sigling, men hetta avsannar Óli Hammer og sigur, at einki er í hesum tíðindum.

Ávísur áhugi er fyri gomlu Norrönu

– Skipið er ikki selt enn, men ein søla kann koma uppá pláss, nær tað skal vera, sigur Óli Hammer, stjóri í Smyril Line

GAMLA NORRÖNA
Vilmund Jacobsen

– Orsøkin til, at gamla Norröna ikki er seld enn, er, at vit vilja ikki lata skipið fyri lítið og lætt, sigur Óli Hammer

Gamla Norröna liggur framvegis í Esbjerg. Hon er ikki seld enn, men Óli Hammer sigur, at tað framvegis er ein ávísur áhugi fyri at keypa skipið.

Hann sigur, at tað er meiri enn tann eini keyparin, sum vísir skipinum áhuga.

Spurdur, nær hann vantar, at ein søla fer at fara fram, sigur Óli.

– Vit hava eftirhondini hildið okkum hava selt skipið meira enn ta einu ferðina, men enn er eingin peningur komin.

Hann dugir ikki at siga, nær ein endalig søla fer fram, men vísir á, at tað kann verða nær sum helst.

– Í morgin, sum ein annan dag, sigur hann.

Óli sigur, at teir, sum hava ætlað sær at keypt skipið, men eru lopnir frá, hava havt ryggin frían.

– Teir hava sloppið sær burtur úr aftur avtaluni, sum vit mettu var komin uppá pláss, sigur Óli Hammer.

Stjórin í Smyrl Line vil ikki siga, hvussu nógv felagið stílar eftir at fáa fyri skipið.

– Orsøkin til, at gamla Norröna ikki er seld enn, er, at vit vilja ikki lata skipið fyri lítið og lætt, sigur Óli Hammer.

Teir eru »hot«

Elin í Stórustovu hevur fingið heitu donsku dreingirnar Nik og Jay til Føroya. Teir skulu hava konsert í badmintonhøllini tann 23. august

Mynd: Álvur Haraldsen

Nik og Jay, sum eru eitt av heitastu nøvnum í bæði Danmark og Føroyum nú, leita sær til Føroya í komandi viku. Her skulu teir hava eina konsert í ítróttarhøllini á Hálsi, og teir verða eisini at hitta í SMS og at síggja í Club 20. – Teir duga væl at upptraðka. Tað ljóðar væl á fløgunum, men tað ljóðar uppaftur betri live, sigur Elin í Stórustovu, sum hevur verið á fýra konsertum hjá Nik og Jay, og sum eisini hevur syrgt fyri at teir koma hendan vegin

KONSERT
Ingrid Bjarnastein

Tann 23. august fer eitt av heitastu nøvnunum í Danmark á pall í Føroyum. Talan er um Nik og Jay, sum í seinastuni hava hittað stórt við løgum sum »Hot« og »Elsker hende mere«, og hava tey eisini verið nógv at hoyra her heima.

Elin í Stórustovu stendur aftanfyri alt stríðið og alt arbeiðið í at hava fingið vælumtóktu donsku dreingirnar til Føroya, og hon greiðir soleiðis frá gongdini:

– Eg hugdi á DR1 ein dagin, og har sá eg eitt videolag, sum æt »Elsker hende mere«. Eg helt tað var gott, og nakrar dagar seinni sá eg tað aftur, og tá fór eg so oman í 3´aran at keypa fløguna. Inni í fløguhúsanum stendur heimasíðan hjá teimum, og eg fór so inn har og las og hugdi eitt sindur, og kom til ta niðurstøðu, at eg hevði kunnað hugsað mær at sloppið á konsert.

Men sum ikki einaferð tá ein býr í Føroyum, so er tað eitt sindur trupult at sleppa á konsertir hjá stórum nøvnum, bæði úr Danmark og sum vitja í Danmark. Men inni á heimasíðuni er ein leinkja til bookingfelagið hjá Nik og Jay, so Elin gjørdi av at skriva til teirra og spyrja um tað ikki var eitt hugskot, at teir komu hendan vegin.

– Eg fekk svar aftur, har bookingmanagerin segði, at tað var gamani, og at eg kundi bara sjálv royna at finna útav, hvat og hvussu. Av fyrstan tíð var tað ikki meiningin, at eg skuldi gera alt hetta arbeiðið sjálv, men so byrjaði eg at spyrja meg fyri ymsastaðni, og so koyrdi tað bara, greiðir Elin frá.

Á konsertir

Alt byrjaði í mars mánaði, so tað hevur verið nógv at fáa uppá pláss seinastu tíðina.

– Eg fór niður til Danmarkar at hitta bookingmanagerin har, og so slapp eg eisini á konsert við Nik og Jay, og síðani tá havi eg verið á fleiri konsertum. Teir duga væl at upptraðka, og tað ljóðar væl á fløgunum, men tað ljóðar uppaftur betri live, heldur Elin.

– Tá eg var á konsertunum so sá eg, hvussu alt var við ljós og ljóði og so framvegis. Teir fara at hava tað sama í Føroyum, har teir koma at hava tríggjar ljós- og ljóðmenn við.

At skipa fyri eini tílíkari konsert krevur nógv arbeiði, og sigur Elin eisini, at tað hevur verið ógvuliga tíðarkrevjandi.

– Tað er so nógv eyka, sum skal gerast, tá teir koma til Føroya. Flúgvara og hotell og so víðari, og tí er tað týdningarmikið, at ein fær góðar stuðlar. Uttan stuðlarnar hevði hetta als ikki latið seg gjørt.

Stuðlarnir til konsertina eru Tryggingarfelagið Føroyar, KontoIn, Shell, Pepsi, Atlantic Airways og Hotel Føroyar.

– Alt kostar ótrúliga nógv. At leiga høll, anlegg, hotell, flúgvari og so framvegis. Tað eru nógvir pengar, sum tað snýr seg um, og tað má bera seg uppá onkran máta. Tí gerast atgongumerkini eisini dýrari her enn í Danmark.

Ikki playback

Ferðalagið, sum telur 14 fólk, kemur fríggjadagin í næstu viku. Umframt at hava hasar tríggjar ljós- og ljóðmenninar verða fýra tónleikarar við eisini.

– Tað eru fleiri sum hava spurt meg, um tað ikki er alt playback, men tað er tað barastani ikki. Alt er live, staðfestir Elin við tíggjutumma seymi.

Fólkini hava nógv útgerð av øllum sløgum við, og longu fríggjadagin verður lagt í vaðið, tá heitu dreingirnir skulu oman í Club 20.

Leygardagin verða teir í SMS og skriva autografar og leygarkvøldið verða teir í høllini á Hálsi.

– Eg haldi, tað er gott at fáa teir til Føroya nú, tí tað er nú teir eru frammi og kendir. Sum oftast so koma slík nøvn til Føroya eitt ár aftaná tey hava verið frammi. Vit fáa teir ongantíð hendan vegin meðan tað framvegis er »heitt«, sigur Elin.

Og Nik og Jay eru »hot«, tað kanst tú uttan iva staðfesta. Teir hava fyrst stuttum selt dupult platin í Danmark, sum eru 100.000 fløgur, og teir hava eisini vunnið fleiri virðislønir í Danmark fyri tónleikin.

Nú er eisini ferð komin á atgongumerkjasøluna. Neyvu tølini eru ikki komin enn, men atgongumerki fáast til keyps í Shellstøðunum kring landið og í Kunningarstovuni í Havn.

Framførslan hjá Nik og Jay á Hálsi kemur at verða 70 minuttir til longdar uttan steðg. Og er lív í áskoðarunum, so kann tað væl vera, at okkurt eykalag eisini verður á skránni.

Sunnudagin skulu teir runt í Føroyum til eitt sindur av »sightseing«, og teir flúgva avstað aftur mánamorgun.

Vilt tú hava meira at vita um Nik og Jay ber til at fara inn á heimasíðuna
www.nikogjay.dk